

## Tónleikur

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



## Fløgu ummæli: ★★★★★☆

# Eitt skitið tok í ljósum loga

**Bólkur:** Boys in a Band
**Fløguheiti:** Black Diamond Train
**Útgávudagur:** 19. juli 2008
**Tikin upp:** Earth Terminal Studios, Hampshire, Ongland

UMMÆLI
*Petur Háberg*
*petur@sosialurin.fo*

Tað hevur gingið skjótt fyri seg hjá teimum fimm ungu monnum í Boys in a Band. Bólkurin varð stovnaður í september 2006 og nú, ein GBOB-finalusigur, tríggjar Planet-virðislønir og óteljandi konsertir seinni, geva teir út sína fyrstu fløgu.

Lat okkum fáa tað keðiliga av vegnum beinanveg: mær dámar ikki fløguhúsan. Ella meiri nágreiniliga; permuna. Tað er, sum um hon roynir at vera kitch og rotin uppá tann kula mátan. Tá ið tað riggar, so er tað feitt. Men tá ið tað ikki ger, sum í hesum føri, so er tað bara rotið uppá tann ókula mátan. Eitt sindur misvísandi fyri innihaldið á fløguni. Restin av húsanum er hinvegin heilt ókey. Ikki nakað genialt, men heilt ókey.

Eitt, sum tó er deiligt við húsanum, er, at man kann lesa tekstirnir á sangunum. Orki ikki fyri at seta meg við eini fløgu, sum ikki hevur tekstirnar við í fløguhúsanum. Ja, ein kann sikkurt finna teir á netinum onkrastaðni ella skriva teir niður við hond, men allíkavæl...




*Niels Pauli Lamhauge hevur sniðgivið húsan*

**Orðini skulu tyggjast**
Allir tekstirnir eru á enskum og á stak góðum enskum. Pætur Zachariasson yrkir spennandi og djúpt, og tekstirnir skulu lesast nakrar ferðir ígjøgnum, áðrenn ein skilir teir. Ella 'heldur', at ein skilir teir. Tingini verða ongantíð penslað út fyri einum, og ofta ivast ein í, hvønn ella hvat teksturin er um. Og tað dámar mær væl. Pætur gevur lurtaranum/lesaranum nakað at hugsa um, og hann krevur, at tú setur teg niður við tí og gevur tær góðar stundir.

Tað er gott at tyggja, áðrenn ein svølgir.

Meðan tónleikurin er up-tempo og 'glaður', so eru orðini eitt sindur meiri melankolsk og sorgblíð. Eitt dømi er sangurin Secrets To Conceal, ið koyrir avstað við fullari ferð, men hevur hesi mótleysu orð: »When you told me to run – I ran to the end of the world – And when I reached the edge – There was nothing left to say«

**Við svøkum dreingjum í huga**
Tað er altíð eitt upplivilsi at vera til eina Boys in a Band konsert. Seinast, eg hoyrdi teir, var á G! MINI, og hóast alt gekk galið (gittarar stemmaðu ikki, stativ koppaðu, menn spældu skeivt, leidningar duttu úr í heilum osfr.), so vóru teir genialir og sparkaðu reyv. Tað var rock and roll allan vegin. Og tað er eisini tað, sum BIAB handlar um; at seta eld á alt og øll.

So tá ið eg seti meg niður at lurta eftir Black Diamond Train, so er tað við hesum svøku dreingjunum í huga. Og teir taka meg gjøgnum nøkur fantastisk løg, nøkur góð og so nøkur, ið mær ikki dámar nakað serligt.

**Professionelt fesj**
Sum tey flestu vita, so hava viðurkendir menn handskað fløguna. Feðgarnir Ken og Jolyon Thomas hava framleitt og miksað. Og hóast hesir eru í heimsflokki, so er ikki talan um pussað popp-sound (og tað er kanska tí, teir eru í heimsflokki). Ljóðið er skitið og rátt. Júst sum BIAB eigur at vera. Trummur og bassur eru komprimerað í topp, og so at siga alt yvirstýrir. Sjálvt sangurin hjá Pæturi yvirstýrir. Og tað er rock and roll.

**Rópar hann ikki bara?**
Í fjør vann Pætur Planet-virðislønina fyri ársins mannliga sangara. Og á Black Diamond Train prógvar hann, at hettar er fult uppiborið.

Jamen rópar hann ikki bara? Nei. Serliga á teimum meiri downtempo løgunum vísir hann, at hann dugir at syngja. M.a. á lagnum um Brandon, ið flýggjar úr geglinum, »Before The Flood«, vísir Pætur sínar dygdir sum sangari og minnir ikki sørt um ein annan Brandon (ella møguliga er talan um sama?), Brandon Flowers úr amerikonsku The Killers. Men at rópa dugir hann eisini. Betri enn nakar prædikumaður, eg nakrantíð havi hoyrt.

**Míni yndisbørn**
Míni persónligu hæddarpunkt liggja í seinna endanunum á fløguni. Eg skal ikki leggja lok á, at eg persónliga eri ein »sucker« fyri melodiøsum rokki. Og hóast fimm tær fyrstu skeringarnar eru sterkar og gjøgnumførdar, so er tað skering seks, »Dance In The Pale Moonlight«, ið eg altíð koyri fyrst á, tá ið seti fløguna í. Lagið byrjar við einum drepandi feitum synthljóði, áðrenn restin av bólkinum kemur inn og leggur seg runt um synthin, ið koyrir kompromisleyst víðari. Niðurlagið, við breakum og fangandi sangi, hevur meiri enn eina ferð givið mær kuldaskjálvta.

Umframt »Dance In The Pale Moonlight« so er »Son Of Man« og »Before The Flood« mínir favorittar. Besta pettið yvirhøvur á fløguni er niðurlagið í »Son Of Man«: »So does this son of man...« - so skinkufeitt!

Sum heild er Black Diamond Train ein av bestu føroysku fløgunum nakrantíð. Tann besta? Nei, men har uppi. Tann føroyska útgávan við størst altjóða gjøgnumbrotmøguleikum? Ja.




*- Í fjør vann Pætur Planet-virðislønina fyri ársins mannliga sangara. Og á Black Diamond Train prógvar hann, at hettar er fult uppiborið, sigur Petur Háberg m.a í sínum ummæli av debutfløguni hjá Boys in a Band*

*Mynd: Olivier Donnet*

**Hoyr heitislagið »Black Diamond Train«, »Dance In The Pale Moonlight«, 15 Tær Bestu hittið »Secrets to Conceal« og »Before The Flood« á myspace.com/boysinaband**